# Langur vetur í ferðsluni



**Landsverk:** Aftur í morgun varð boðað frá vetrarlíkindum í ferðsluni kring landið. Veturin er ávegis og fólk gera seg kláran til bilferðslu undir broyttu umstøðunum.

Ein uppgerð frá Landsverki vísir, at seinasta vetur var fyrsti hálkudagurin hin 22. oktober og tann seinasti hálkudagurin so langt frammi sum 23. mai í ár.

– Flestu hálkudagarnir vóru í mars og apríl mánaði, upplýsir rakstrarleiðarin á vegadeildini, Finnleif Durhuus.

Tølini komu fram á tí sokallaða vetrarfundinum, sum arbeiðsfólkini í vetrarhaldinum skipa fyri eina ferð um árið. Samanlagt vóru 92 hálkudagar seinasta vetur, umframt 27 dagar við svartakálki.

– Um vit samanbera við aðrar vetrar, so var seinasti veturin ein friðarligur vetur við lítið av kava, varð staðfest á fundinum.

**sb.**

# Ein góð íløga í hjúnalagið

**Oasan:** Aftur í ár hevur tað eydnast samkomuni Oasuni í Hoyvík at fáa prædikumannin, Eivind Frøen at luttaka á árliga hjúnabandsskeiðnum.

Aftur í ár verður hetta skeiðið hildið á Hotel Vágum í januar mánaði komandi ár. Kostnaðurin fyri skeiðið er settur til 2400 kr.

Legan er ætlað øllum hjúnum, í øllum aldri, og so er líkamikið um talan er um nýgift ella pør sum hava verið gift leingi. Pláss er fyri 24 hjúnum.

– Hetta er kanska nógvur peningur at gjalda. Men hetta er avgjørt ein góð íløga í hjúnalagið, verður sagt úr Oasuni.

**sb.**

# Nýtt framtaksfelag skal menna føroyska vinnulívið

**Nýggja partafelagið Løkir hevur til endamáls at keypa føroyskar og útlendskar fyritøkur og síðani menna tær.**

**– Við hesum felagnum kunnu vit gera størri íløgur enn tær, ið vit annars vóru førir fyri einsamallir, sigur formaðurin í nevndini, Petur Háberg Jacobsen**

VINNULÍV
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*- Gerið so væl. Alt er til reiðar! – Her standa rundstykkir á skránni, men nýggja framtaksfelagið Løkir er til reiðar at keypa seg inn við størri ella minni parti í føroyskar og útlendskar fyritøkur. Vinstrumegin: Óla Jákup Kristoffersen, stjóri í Løkir; nevndarformaðurin Petur Háberg Jacobsen; forstjórarnir í Føroya Banka, Janus Petersen og Súni Schwartz Jacobsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Framtak:** Tað er Føroya Banki saman við partafeløgunum Krúnborg og Tjaldur sum í felag hava stovnað hetta nýggja framtaksfelagið við heitinum Løkir.

Partapeningin í felagnum kemur frá teimum 20 mió. kr., sum hesi trý feløgini hvør sær hava sett í.

Men óhugsandi er ikki, at bæði partapeningur og eigaraskari verða víðkað í framtíðini.

– Tað er altíð lættari at lyfta tungar íløgur, tá fleiri eru saman um tær, sigur formaðurin í nevndini, Petur Háberg Jacobsen, sum umboðar Krúnborg í felagnum.

Saman við hesum felagnum eru Føroya Banki og Tjaldur somuleiðis við.

Stovnandi fundur í felagnum var fríggjadagin og varð Óla Jákup Kristoffersen, advokatur tá settur sum stjóri. Hann er eisini nevndarlimur, saman við Líggjasi í Bø.

## Størri dynamikk

Hetta er kortini ikki fyrsta framtaksfelagið her á landi. Í dag eru eisini onnur feløg við líknandi endamálum.

Men á tíðindafundi í morgun varð kortini sligið fast, at tað er tørvur á slíkum feløgum til tær broytingar, sum føroyska vinnulívið er í í løtuni.

– Tað er ikki eitt framtaksfelag ov nógv í dag. Tað er týdningarmikið at hava slík feløg, sum kunnu keypa og menna fyritøkur, sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banki.

Ætlanin hjá Løkir er einfalt at keypa og menna fyritøkur í Føroyum og uttanlands – og síðani at selja tær.

Við hesum felagnum er ynskið at skapa størri dynamikk í samfelagið. Soleiðis verður nú lættari at keypa og selja fyritøkur – og at verða keyptur.

## Ættarliðsskifti á veg

Her kann talan verða um fyritøkur, sum verða einskildar, ella fyritøkur sum standa fyri einum ættarliðsskifti, ella fyritøkur sum snøgt hava tørv á at peningi fyri at vaksa.

Ein treyt er tó við hvørjum einstøkum handli:

– Vit ætla bert at gera íløgur í feløg, sum vit meta at vit kunnu verða við til at menna, slær Petur Háberg Jacobsen fast.

Við teimum 60 mió. er møguleiki fyri at fara til verka longu nú. Hóast lítil tíð er eftir at hesum árinum, so verður kortini ikki útilokað at ikki onkur handil kann verða framdur longu í ár.

> ”*Hvør íløga skal verða ein løkur, sum skal gerast til stóra á!*

– Verður talan um størri verkætlanir, so ber til at hækka partapeningin, sigur hann.

## Mangir løkir

Øll feløgini í nýggja framtaksfelagnum hava dugað at sæð, at tørvur er á enn einum slíkum felagi í føroyska samfelagnum.

Sum støðan er í dag finnast nógvar fyritøkur við fáum eigarum. Haraftrat er mangan talan um fyritøkur sum hava nakað nógv ár á baki, og tí standa fyri einum eigaraskifti og helst eisini einum ættarliðsskifti.

Her kann nýggja framtaksfelagið seta pening í og síðani menna fyritøkuna við førleika teirra, áðrenn fyritøkan verður seld aftur fyri eitt vónandi størri virði.

Við virðisbrævamarknaðinum verða góðir møguleikar skaptir fyri hesum, og nú einskiljingar standa fyri framman, kann nýggja felagið gerast ein virkin partur av hesum.

– Á henda hátt verður føroyska vinnulívið meiri attraktivt, og verður hetta til gagns fyri allar partar, sigur Janus Petersen.

Teir gera tí kenda orðatakið til teirra: "Mangir løkir smáir, gerast stórar áir". Nú eitur tað: "Hvør íløga skal verða ein løkur, sum skal gerast til stóra á!"

## – Møguleikar fyri vøkstri

Fyri stjóran í Føroya Banka, Janus Petersen er eingin ivi um at tørvur er á fleiri slíkum framtaksfeløgum.

Ætlanin er tó ikki at bankin skal verða tann dominerandi parturin av nýggja felagnum. Men ætlanin er at meta sum ein partur av eini langsiktaðari virkisætlan hjá bankanum, sum í roynd og varð sett í verk í fjør.

Endamálið við hesi ætlanini er at fáa bankan at vaksa á øllum økjum, m.a. við at verða við í slíkum framtaksfelagi.

– Nú henda ætlanin er framd í verki, síggja vit stórar møguleikar fyri vøkstri á økinum, sigur Janus Petersen.

Í teirra eygum er greitt, at við fleiri slíkum feløgum á marknaðinum verður hesin meiri effektivur. Og hetta førir so aftur við sær, at størri virði verða í fyritøkunum.

Nýggja Corporate Finance deildin hjá Føroya Banka fer at standa fyri teimum virðismetingum og keypsætlanum, sum skulu gerast, tá framtaksfelagið keypir fyritøkur.

## FAKTA

| | |
|---|---|
| **Navn:** | Løkir |
| **Endamál:** | At keypa fyritøkur og menna tær. |
| **Stovnarar:** | Føroya Banki, p/f Krúnborg og p/f Tjaldur. |
| **Partapeningur:** | 60 mió. kr. – 20 mió. frá hvørjum felagi |
| **Stjórn:** | Stjóri Óla Jákup Kristoffersen. Nevndarformaður Petur Háberg Jacobsen. |